# Guitarframsýningin '08




Komandi vikuskifti verður møguleiki, at síggja flottastu, serligastu, elstu og dýrastu guitararnar í landinum, alt á einum stað.

Guitarframsýningin 2008 fer at hýsa hesum framúrskarandi ognunum sum í fleiri førum samla støv heima hjá fólki í Føroyum. Fremstu tónleikarar í landinum fara at fremføra. Eitt nú Guðrið Hansdóttir, Kári P, Martin Joensen, Uni R. Debess, Holgar Jacobsen, Lena Andersen og Rasmus Rasmussen.

Guitarframsýning verður í Müllers Pakkhúsi 4.- og 5. oktober 2008. Opið frá kl. 14 til 20. Atgongumerki við dyrnar, kr. 100,- børn ókeypis. Atgongumerki er galdandi báðar dagarnar. Kafé verður eisini, har ið fólk eitt nú kunnu keypa sær kaffi, sodavatn og kakur.

Skráin fyri framførslurnar. Leygardagin: Holgar Jacobsen kl. 15, Rasmus Rasmussen kl. 16, Martin Joensen 17 og Lena Andersen kl. 18. Sunnudagin: Uni R. Debess kl. 16, Guðrið Hansdóttir kl. 17 og Kári P kl. 18.

Yvirskotið av tiltakinum fer til Føroya Felag móti Krabbameini.

**Dagurin**
**3. oktober. Metta**. Teir vita ikki um nakra halgikvinnu við hesum navni. Navnið er Margreta stytt.




## Lýsing frá bilasøluni Norröna í 1947

**Bilasølan Norröna fór undir sítt virksemi seinast í fýratiárunum. Tað vóru svágrarnir Petur Háberg og Jens Christian Christiansen (Kissa), sum seldu fleiri ymisk bilmerki sum t.d. Standard, Triumph, Simca, Moskwitch, Volga og Plymouth.**

**Umboðsmenninir hildu til í Kristnastovu í Gongini í Havn. Í 1965 gevast Petur Háberg og Kissa at selja bilar, og Reimar Isaksen, ið hevði Akkumulatorvirkið Monty við Grønlandsvegin, yvirtók bilasøluna Norrönu.**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Edith av Fløtum**, búsitandi í Tórshavn, ættað úr Porkeri, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin, 84 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 17.30. Jarðarferðin verður úr Ebenezer fríggjadagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Edith, kunnu lata Kristniboðssambandinum, Landavegur 98 eina gávu. Konta í peningastovnunum.

**Johannes Bjørgheim Rasmussen, Klaksvík**, vanliga nevndur Johannes í Grótinum, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 30. september, 71 ára gamal.

**Sofus Danielsen úr Nólsoy**, andaðist á Landssjúkrshúsinum mánadagin, 68 ára gamal. Kistan fer av Landssjúkrahúsinum mikudagin klokkan 15. Jarðarferðin verður úr Nólsoyar kirkju hósdagin klokkan 13.

Kistan við **Benrosu Joensen, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi í Christianskirkjuna mikukvøldið kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Benrosu, kunnu lata Bjargingarbátinum Ziska eina peningagávu, konta í Norðoya Sparikassa

**Kristense Gåsland**, fyrrv. trúboði í Betania, Skopun, andaðist mánadagin 29. september, 94 ára gomul. Jarðarferðin verður frá samkomuni Klippen, Bremnes, Noreg, fríggjadagin 3.oktober kl. 12 (norsk tíð).

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi, abbi og langabbi okkara

**Ernst Wesenberg Samuelsen**
ættaður úr Klaksvík
búsitandi í Hoyvík

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 29. september, 73 ára gamal.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum í kvøld kl. 19.30.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju, fríggjadagin kl. 15.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Maria, Johan og Ann Mari v. fam.**

Tey, ið vilja minnast Ernst, kunnu lata Føroyafelag móti krabbameini eina gávu. Konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður, at okkara góði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Johannes Bjørgheim Rasmussen**
vanliga nevndur Johannes í Grótinum

andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 30. september, 71 ára gamal.
Kistan fer úr kapellinum heim í Christianskirkjuna leygarkvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður sunnudagin kl.13.30.

**Marianna, Maria, Poul Juul og Hjalti við familju**

Tey, ið vilja minnast Johannes, kunnu lata eina peningagávu til Hjartafelagið, konta í Norðoya Sparikassa og Eik.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við